DAGSINS MEINING

Billurin úti við seks-løbaranum - abort og ølsøla standa fyri skotum

Tað sær ikki mætari út enn, at tað verður tann pinkulítli Miðflokkurin, ið fer at seta dagskránna í føroyskum politikki, skulu vit meta út frá fyrstu vikunum hjá landsstýrinum. Komin inn um í Tinganesi festir landsstýrismaðurin eld í eitt sera eymt mál, abortspurningin. Hvønn veg tað ber er helst óneyðugt at siga her. Atgongd til journalar hjá einstøkum kvinnum, ið hava fingið abort. Ikki nóg mikið við tí. Fáar dagar seinni er Billurin aftur uppá spæl. Nú skal útsølan av øli steðgast ella flytast út um bøgarðarnar, har eingin skal síggja tann ólevnað, sum ølið forsakar.

Sjálvandi mugu vit respektera, at ein meiriluti í tinginum hevur skipað eina samgongu. Men vit loyva okkum at seta spurningin beinleiðis til størsta flokkin í samgonguni og tess formann, sum nú rekir starvið sum varaløgmaður í eini Heimastýrissamgongu, hví tað var so altavgerandi at fáa Miðflokkin við, tá man kortini slepti so gott sum øllum sínum fullveldispolitikki og lat AD fullkomiliga bestemma sjálvstýristilgongdina, sum tá avtornaði heldur ikki gjørdist oðrvísi enn tað Javnaðarflokkurin kundi ganga við til. Hvussu ber tað til, at hesin flokkur,ið á fleiri økjum hevur staðið fyri skilagóðum politikki fyri einhvønn prís skuldi hava Jenis og Billin við? Tað kundi so ikki vera fyri at halda fram við fullveldistilgongdini, tí hon er jú strikað/slept ella lødd á ís, skulu vit ganga eftir tí sum løgmaður sigur. Vit koma ikki til aðra niðurstøðu enn hana, at einasta orsøkin hjá Tjóðveldisflokkinum til at krevja Miðflokkin í samgonguna var at halda Javnaðarflokkin uttanfyri alla ávirkan og vald. Tað eydnaðist men vit eru longu farin at síggja avleiðingarnar.

Miðflokkurin hevur uttan iva mong góð mál í síni skrá, eitt nú hevur hann raðfest sosialmál høgt í seinastuni, men kortini er tað ein sannroynd, at nógv av hansara ekstremu málum kunnu hvørki A ella E og eiheldur C ganga inn fyri.

So kunnu tjóðveldismenn siga, at hann hevur bara ein landsstýrisman og hevur tí minimala ávirkan. Hetta er ikki rætt, tí flokkurin hevur fingið eitt heilt nýtt øki, familju- og trivnaðarmál,ið er torført at definera. Tað hevur í veruleikanum eitt bein inn í øll ráð. Og tað er júst hetta vit eru vitni til. Billurin vil avtaka útsølu av øli. Djurholm sigur, at hetta er ikki hansara øki og biðjur hann blanda seg uttanum. Men Billurin hevur svarið klárt. Hetta er jú eisini eitt familju- og trivnaðarmál.

Vita Tjóðveldið og Fólkaflokkurin veruliga, hvat teir eru gingnir inn til, tá teir hava givið Miðflokkinum, ið bert telur góð 4% av veljarnunum, ábyrgdina av øllum familju- og trivnaðarmálunum! Ein flokkur, ið bert umboðar ein evarska lítlan part av føroyingum skal siga, hvussu 96% av fólkinum skulu bera okkum at í gerandisdegnum. Løgmaður hevur úttalað, at Miðflokkurin stóð síðst á listanum. Hvussu ætlar Tjóðveldisflokkurin, ið setti Jenis og Bill fyrst á listan, at familju- og trivnaðarpolitikkurin skal verða rikin í skúla- og mentamálaráðnum, í almannaráðnum, í figgjarmálaráðnum og í løgmálaráðnum! Er tað ikki nakað, sum longu er lagt í hendurnar hjá Bill og Jenis at taka sær av!

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Íbúðir ella neyð?

Thorbjörn Brochs

Tá ið pressan ella politikkarar hava funnið eitt mál, sum til ber at halda koyrandi longri tíð, verða loysnirnar gjarna ógvusligari og dýrari, enn neyðugt er. Uppskotini um hvussu vit loysa íbúðartrupulleikarnar í Havn, fylgja sama mynstur. Tey taka til dømis ikki hædd fyri, at búskapurin sum heild longu er upphitaður. Tey taka ei heldur hædd fyri, at tað longu ídag eru ov fáir handverkarar til at nøkta tørvin.

Hann, ið hevur byggifyritøku, er sjálvandi glaður fyri at hita marknaðin enn meira. Tað ger, at prísurin á ta lidnu vøruna verður hildin har uppi, sum tað størsta yvirskotið heldur til. Men hvat halda bygdafólkini, sum royna at flyta til Havnar? Eins og vit, halda tey helst, at prísurin ikki eigur at hækka nógv afturat.

Uttan at kunna siga nágreiniliga, hvat ein nýggj íbúð í Havn fer at kosta, so giti eg, at hon endar við umleið kr. 800.000. Túsund stk. geva tá eina eyka íløgu uppá 800 milliónir. Fyri 100 milliónir kunnu vit fáa somu nøgd, og enntá skjótari.

Fyrst eiga vit nógvar tímar íbúðir. Síðani eiga vit kjallarar, sum eru partvíst innrættaðir, og harafturat kjallarar, sum ikki eru innrættaðir. Men tær eru oman jørð. Nógvar íbúðir kunnu leigast út ímorgin. Nakrar krevja minni íløgur, aðrar krevja størri íløgur. Eg kann ikki vísa til hagtøl, sum siga, hvussu nógvar íbúðir eru tómar, ella hvat tað fer at kosta í miðal, at innrætta hinar kjallararnar. Sjálvur tori eg at gita, at tað fer at kosta í miðal kr. 100.000. Íløgan uppá 800 milliónir er nú minkað niður í 100 milliónir. Men minst til, at eg nú tosi um tær fyrstu umleið túsund, sum í miðal kosta minst at seta í stand.

Umframt fyrimunin við at gera lægri íløgur, eiga vit fyrimunin við, at íbúðir kunnu leigast út longu áðrenn komandi skúlaár byrjar.

Spurningurin er, um politikkararnir vilja hava nakra loysn, tí so hava teir tað minni at fara til val uppá. Men um vit eiga minst tvey tíðindafólk, sum vilja – og sleppa – at lýsa málið, sum tað veruliga er, so hava tey húsleysu møguleika, at skilja grundina til, at fólk ikki leiga út, sjálvt um avkom teirra er floygt. Grundin til, at so fá vilja leiga út, er helst, at tey noyðast at rinda skatt, bæði av inntøkunum og av útreiðslunum. Eg kann ikki ímynda mær eitt leigumál, har nettoinntøkan er yvir 30%. Vísir roknskapurin hægri avlop, eru ikki allar útreiðslurnar tiknar við, ella húsaleigan er í serklassa.

Vilja tíðindafólk finna útav, hvat passar og ikki, so kunnu tey seta seg í samband við ein royndan grannskoðara ella annan ráðgeva, sum veit nakað um at byggja hús og halda tey. At spyrja ein politikkara er eingin loysn, tí at verða valdur politiskt, gevur ongan kunnleika av sær sjálvum. Hin fólkavaldi skal fáa upplýsingar til vega, sum so verða grundarlag undir avgerðir hansara. Er hann ikki so frægur, at hann ger tað, skulu tíðindafólk traðka til, og nú hava tit bíðað ov leingi.

Eingin, sum umsitur figgjarmál, er glaður fyri at lækka nakran skatt. Afturat kemur tað, at embætismenn eru so eymir um mannagongdina hjá sær, at teir síggja eina hóttan í øllum broytingum. Hesaferð havi eg eitt uppskot, sum kann geva meira í lands- og kommunukassarnar, uttan at fleiri almenn størv verða smíðað. Kanska er tað ein ring gerð, men hygg einaferð:

Er ljós og hiti við í upphæddini, skal útleigarin rinda 20% av skatt av allari upphæddini. Er ljós og hiti ikki við, skal hann rinda 25% skatt av allari upphæddini. Hetta svarar nøkurlunda til, at nettoavlopið av húsaleiguni er 40%. Tá hevur tað almenna fingið meira, enn rætt er, men minni enn nú. Og tó haldi eg, at báðir partar hava vunnið. Útleigarin sparir stríðið við at skaffa fram nágreiniligan roknskap, og land og fólk spara ein riðil av óneyðugum starvsfólkum. Hvør vil so rokna út virðið av, at vit longu í ár hava virðilig viðurskifti at bjóða teimum lesandi?

Nýggj framsýning um Oljuleiting í Føroyum letur upp

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin 29. juni 2002 letur Jarðfroðisavnið upp framsýningina »Oljuleiting í Føroyum«.

Eftir at oljuleitingin við Føroyar av álvara tók dik á seg, hava fjølmiðlar javnan borið út tíðindi um oljuvirksemið við Føroyar. Nýggja framsýningin dregur samanum hendan streymin av tíðindum og lýsir m.a. hvussu olja kann finnast í undirgrundini, og hvørji viðurskifti elvdu til, at ein oljuleiting við Føroyar byrjaði fyri nøkrum árum síðan. Oljuleitingarvirksemið við Føroyar verður lýst í einum altjóða høpi, har greitt verður frá, hvørja ávirkan olja hevur á heimspolitik og búskap.

Millum forvitnisligu lutirnar á framsýningini ber til at síggja grótsløg við olju. Tað eina slagið av gróti við olju er móðurgrýtið, Kimmeridge Clay, ríkt av plantu- og dýraleivdum, sum í djúpt liggjandi løgum er vorðið umskapar til olju. Hetta grótslagið er móðurgrýtið fyri meginpartin av oljuøkjunumí øllum Útnyrðingsevropa. Eitt annað framvíst grótslag, sum er so ríkt í olju, at tað er litað myrkt, er gott dømi um goymslugrýti, har tilber at útvinna oljuna.

Borivirksemið á so djúpum vatni, sum í føroyska havøkinum, setir stór krøv til øll trygdarviðurskifti, bæði fyri arbeiðsfólki og havumhvørivð, og hetta er eitt av stóru evnunum, sum framsýningin á Debesartrøð tekur upp.

Framsýningin um Oljuleiting í Føroyum er at síggja í framsýningarhølunum hjá Náttúrugripasavninum á Debesartrøð. Upplatingartíðirnar eru mánadag til fríggjadag frá kl. 11 til kl. 16, og leygardag og sunnudag frá kl. 15 til 17 stendur í tíðindaskrivinum frá Jarðfroðissavninum.

Sosialurin

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstaðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-fríg. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Flogvøllinum og Parkeringsøkinum

– Spurningar til Annfinn Kallsberg viðvíkjandi

Marjus Dam
løgtingsmaður

Sambart valblað Fólkafloksins áðrenn valið, verður flogvøllurin longdur, eins og peningur er tøkur tøkur til endamálið. Er tað ikki gleðiligt? - ella er tað bert bluff - einaferð enn?

Nakrar dagar áðrenn valagnið - risastóru pensiónirnar - vórðu útgoldnar sjálvan valdagin 30. apríl, varð valblað Fólkafloksins borið út í hvørt hús í Vágum. Á fremstu síðu stóðu greiðu boðini: "FLOGVØLLURIN ÚTBYGGJAST - PENINGURIN KLÁRUR".

Boðini vóru púra greið. Og ikki til at taka feil av.

Sjálvt um valúrslitið vísti, at føroyingar ynskja fullveldi burtur, so situr at kalla sama samgonga enn við róðrið, við Jenisi av Rana sum bjargingarkransi og stýrir ímóti fullveldi. Sjálvt um teir ikki tora at siga tað beinleiðis!

Men nú sami løgmaður situr, og sami flokkur umsitur vinnumál, so má roknast við, at flogvøllurin nú verður útbygdur, sambart teimum sjálvum TÍ peningurin er tøkur at byggja flogvøllin út, sum teir hava sagt fyri øllum føroyingum undan valinum. Vónandi til 1800 metrar. Og ikki bert tað. Í sama valblaðið varð eisini sagt, at peningur - 8,5 milliónir krónur - eisini var klárur at byggja parkeringsøkið kring flogvøllin.

Merkiliga friðarligt hevur verið um hetta stórmál síðan valið. Mangir føroyingar munnu hava áhuga at hoyra svarið uppá hesar spurningar til løgmann:

– Hvussu nógvur peningur er tøkur til at leingja flogvøllin við?

– Á hvørjari konto stendur hesin peningur?

– Hvussu nógv roknast arbeiðið at kosta?

– Hvussu nógvur peningur er settur av til at byggja parkeringøkið kring flogvøllin?

– Á hvørjari konto stendur hesin peningur?

– Nær fara ávikavist arbeiðini at leingja flogvøllin og parkeringsøkið ígongd?

Vónandi kann løgmaður svara skjótt – útfrá greinini í Fólkafloksblaðnum beint undan valinum, er alt jú klárt og peningur tøkur.

Tit skulu tora at vinna!

– Tit skulu tora at vinna, tit skulu tora at tapa, tit eru sum menniskju einastandandi, og útbúgving tykkara skal lyfta fiskivinnuna á hægri støði, segði Kaj Leo Johannesen, løgtingsmaður, í røðu fyri teimum 11 næmingunum, sum fingu Hægri Prógv Innan Fiskivinnu (HIF) á Fiskivinnuskúlanum hósdagin

Eg vil takka fyri at verða boðin við fyri at siga nøkur fyri tykkum, sum hava tikið eitt stig víðari innan fiskivinnuna, tit have við hesi útbúgving fingið ábyrgd av fiskivinnunni, soleiðis at hon framhaldandi kann mennast, til tað bestu í heiminum, tað kunnu tit gera, partvís við vitan, sum skúlin hevur givið.

Tað er eingin loyna at fiskivinnan manglar fólk, sum hava tikið útbúgving, soleiðis at alt kjak um menning innan fiskarí, framleiðslu, og sølu kemur á hægri fagligt støði.

Tað bestu marknaðarføringina fyri fagliga støði hjá tykkum, er fingin gjøgnum European Business Game, við at næmingar hava vist, at teir eru mentir at kappast á jøvnum føti, við okkara vinir og kappingarneytar í Europa.

Tit hava gløggsemi og hugskot, sum ikki bara kappast, men eisini vinna kappingar av slíkum slag, hinvegin sær tað út til at verða ringt at fáa íleggjarir ella bankar við í hesar verkætlanir.

Ítrótturin kundi lært av fiskivinnuskúlanum við at broytt orðingina "vit eru við fyri at læra" til "vit eru við fyri at vinna", tí uttan mun til, um vit vilja ella ikki, so eru vit øll meldað til alheims kappingina, um at gerast best innan fiskivinnu á landi og sjógvi

Tað er lætt at proklamera flosklar um, at vit skulu vísa fiskivinnuni størri ans, men vit mugu eisini kunna siga, og vísa í verki, at vit náa settum málum.

Politiski myndugleikin hevur onga meining havt um fiskivinnuna á landi, men einans á sjógvi, tó eru allir samdir um, at tær loysnir sum gjørdar vóru í 92, vóru krepputoysnir, tá so fiskivinnan í 2002, heldur fram at virka eftir politiskum krepputoysnum, so sigur tað seg sjálvt, at vit ikki síggja nakran váðafúsan kapital.

Vit hava fyri stuttum havt seminar um lønsemi í Føroysku fiskivinnuni, niðurstøðan var at okkara kappingarføri var tað besta, tann viðkomandi spurningurin hesum viðvíkjandi er, hví torir so eingin at gera íløgur í eitt nú fiskivinnuna á landi, tá hon er so kappingarfør?

Vit mugu politiskt seta pening av til útbúgving og gransking, og fáa í lag eitt betri samstarv millum, Útbúgving,Gransking og Vinnulív.

Tað verður tosað nógv um "menning" av nýggjum vørum, soleiðis at viðri av okkara fiskavørum gerst hægri, hettar kann einans gerast við at vitan og kapitalur finna saman, her hugsi eg um kapital sum veruliga er risikovilligur, og sum kann bíða í minst 5 ár, fyri at fáa avkast, hettar eru íleggjarir sum eru professionellir, sum trúgva uppá ett hugskot, sjálvt um verkætlanin, ella virkið gevur hall tey fyrstu árini.

Vit mugu staðfesta at tað at virðisøkja okkara fiskavørir ikki hevur gingið sum ætlað, hyggja vit eftir útflutningshagtølunum, so síggja vit at vit,enn eru nógv best at framleiða til industri og sokallað hálvfabrikata.

Vit skulu arbeiða fram ímóti einari felags marknaðarføring av Føroyskum vørum uttanlands, eftirsum eingin føroysk fyritøka er sterk nokk, einsamøll at lyfta eina marknaðarføring, her hugsi eg ikki um tað einkultu vøruna, men um tað samlaða "image" sum brúkarin kennir aftur, hvørja ferð hann keypir Føroyskar fiskavørir, í hesum sambandi eru vit eisini noydd í stórsta álvara, at hugsað um, hvussu vit koma úr tríðja lands støðuni, mótvegis ES.

Hvussu verða so krøvini og framtíðaravbjóðingarnar til okkum sum fiska, framleiða, og selja fiskavørir, krøvini verða herd eingin ivi um tað, her hugsið eg serliga um umhvørvið og sporingina av fiskinum, frá havinum til endabrúkaran.

ICES kemur við tilráðingum á hvørjum ári um, hvussu stórt trýsti á fiskastovnarnir eigur at verða.

Vit hava longu nú fingið treytir at merkja okkara fiskavørir t. v. s at vit skriva á etikettir ella "labels" at henda liðugtvøran er fiskað í øki FAO 27 Northern Atlantic hettar er sjálvandi ikki av tilvild, um ICES í framtíðini kemur at siga, at veiðitrýsti skal minkast, ella vaksa við tildømis 20%, so skulu vit fylgja tilráðingini, ella koma okkara liðugtvørir, at verða bannaðar á ES marknaðinum, so einkult er tað.

Taka vit heimsins rávørutilgongd av botnfiski, so var hon í 98 uml 9 milliónir tons, síðani hava vit havt eina minking, soleiðis at nøgdin nú er 7 milliónir tons, og tað liggur nøkurlunda stabilt, men stóra framgongdin innan rávørutilgongd, liggur innan aling av botnfiski.

Noreg roknar við at ala 370.000 tons av toski innan 10 ár, so her er ein hóttan ella ein møguleiki hjá okkum, tað er eingin ivi um at aling av botnfiski kemur at hækkað í stóran mun tey næstu árini, hettar er nærliggjandi fyri at fáa javnvág í alheims útbjóðing og eftirspurning.

Lat okkum taka USA og spyrja, hvat kapping vit eru upp ímóti, Innkeyparir á handilsmiðstøðum og matstovum kunnu tildømis, um teir keypa hønsarungar ella aldan fisk, gerða sáttmálar 18 mánaðir fram í tíðina, hvar keyparnir eru tryggjaðir fastan prís, stabila levering eftir einum fastløgdum rammusáttmála.

Teir skulu ikki hugsa um góðar ella vánaligar dollara kursir, góðsku, leveringstrygd, fiskarí, teir vilja heilt einkult hava eina so lítið stressaða tilveru, sum til ber, hillaplass á handilsmiðstøðum kostar nógvar pengar, so um okkara vørur ikki eru kappingarførar so er tað út,avkast til eigarnir av handilsmiðstøðunum, er tað týdningarmesta parametrið.

Afrika, Taiwan, Chile eru bert nøkur sum ala eitt fiskaslag sum nevnist "Tilapia" hetta er ein ferskvatnsfiskur, sum í vekt kann vigað upp til 9 kg, hann veksur skjótt, og er ógvuliga lættur at ala, góðan lit, góðan lit, smakkar væl, og er skjótt á veg fram í USA, sum erstatningur fyri eitt nú Tosk.

Kostnaðurin av at ala eitt kg av hesum fiski er uml 5,00 kr/kg, samanberað vit tildømis (Laks) Salmo Salar sum vit kenna, so er kostnaðurin av at ala eitt kg uml 17.00 kr/kg, tað sum sjálvandi hendir er at forbrúkarin keypir alsamt meira av eitt nú Tilapia liðugtvørum, eftirsum tær eru bíligar, og hava eina stabila góðsku, tú veitst at hvørja ferð tú keypir, fært tú tað sum tú væntar.

Framtíðar heimstørvurin av fiskavørum veksur við umleið 0,5 til 3,0 % um árið í meðal, hettar merkjir at tørvurin í ES veksur áriga við uml 650.000 tonsum og 250.000 tonsum í USA.

Við árslok 2005 vil tað verða ein ónøktaður tørvur uppá 20 milliónir tons um árið og í ár 2010 vil tann ónøktaði tørvurin liggja uppá 40 milliónir tons um árið, tað er bert ein máti at nøkta hendan tørvin, tað er við aling.

Vit fáa av og á spurningin, hvat lívsstarv vit høvdu valt, um vit sloppu at velja umaftur, fyri meg er eingin ivi, eg hevði valt fiskivinnuna, grundin til at eg hevði valt sama lívsstarv innan fiskivinnuna er einkul "fiskivinnan er ikki eitt arbeiði men ein "Lívsstílur" sum er førur fyri at broyta mítt sinnalag, upp til fleiri ferðir um dagin.

Tit skulu tora at vinna, tit skulu tora at tapa, tit eru sum menniskju einastandandi, og útbúgving tykkara skal lyfta fiskivinnuna á hægri støði.

Einaferð enn til tykkum sum eru liðug á Fiskivinnuskúlanum, hjartaliga tillukku við útbúgvingini, og skal mín heilsan til tykkum verða "Verði móti øðrum, sum tit vilja, at onnur skulu verða móti tykkum".

Takk fyri øll somul.

Sosialurin vann á Dimmu

Bæði taparar og vinnarar í spurnarkappingini í útvarpinum mikudagin sleppa víðari í kappingini

SPURNARKAPPING
Eirikur Lindenskov

Mikudagin kappaðust Sosialurin og Dimmalætting í spurnarkappingini í seinnapartssendingini hjá Útvarpi Føroya, Barometrinum. Kappingin var sera jøvn, og svaraðu bæði bløðini rætt upp á allar seks spurningarnar.

Fyri at fáa eina avgerð, var settur eykaspurningur. Liðini fingu bæði at vita, at tann, ið var tættast rætta svarinum, vann kappingin.

Og so kom spurningurin: »Hvussu nógvir tannlæknar eru í Føroyum«. Svarið varð tikið úr Árbókini hjá Hagstovu Føroya, varð upplýst frammanundan.

Dimma, sum skuldi svara fyrst, segði, at teir vóru 27 í tali, Sosialurin, sum svaraði næst, segði 28.

Men rætta talið var 26, segði verturin í Barometrinum, og vann Dimmalætting síðan tepurt á Sosialinum, og kundu blaðstjórin og starvsfólk hansara fegnast um at verða við í kappingini um høvuðsvinningin.

Tað vísti seg kortini, at hetta ikki varð rætt. Fleiri gjørdu Sosialin varugan við, at rætta talið á tannlæknum í Føroyum er 38,5, og at Sosialurin tí var rætti vinnarin.

Sambært Árbókini eru 18 privatir tannlæknar, 8 barnatannlæknar og 12,5 sum bæði eru privatir og barnatannlæknar. Tilsamans eru 38,5 tannlæknar í Føroyum.

Úrslitið av øllum hesum gjørdist, at Sosialurin kortini vann á Dimmu, men av tí at Dimma í fyrsta umfari varð kosin vinnari, sleppur hon eisini víðari í kappingini.